2

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Tórshavn**, 20. oktober 2017

**J.Nr.:** 17/00416-2
(at tilskila í svari)
**Tygara skriv:**

**Viðgjørt:** MS

**Viðmerkingar til broytingar í elveitingarlógini um ymiskar elprísir**

Fíggjarmálaráðið hevur fingið til hoyringar uppskot til løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veitingar av ravmagni, og Fíggjarmálaráðið hevur soljóðandi viðmerkingar til uppskotið.

Við uppskotinum fáa tey, ið nýta góðkendar hitapumpur og elbilar ein fíggjarligan fyrimun við bíligari streymprísi frá SEV. Uppskotið eigur tí at hava bæði fíggjarligar og umhvørvisligar avleiðingar, men hetta er ikki serliga væl upplýst í serligu viðmerkingunum til uppskotið. Serligu viðmerkingarnar eiga tí at vera meira útgreinaðar og upplýsandi hesum viðvíkjandi.

Í uppskotinum er ásett, at SEV kann áseta serligan prís fyri elnýtslu til góðkendar hitapumpur, men tað er ikki nærri tilskilað, hvat góðkend hitapumpa ítøkiliga merkir. Tað eigur at vera greitt ásett í uppskotinum, hvat ein góðkend hitapumpa í hesum føri merkir.

Um SEV skal geva einstøku brúkarunum ein serligan prís til elnýtslu til góðkendar hitapumpur og elbilar, so má SEV eisini í hvørjum einstøku føri vita, at streymnýtslan fer til góðkendar hitapumpur og elbilar. Hvussu veit SEV um streymnýtlsan fer til eina góðkenda hitapumpu ella um tað er ein elbilur, dustsúgvari, køliskáp ella okkurt annað eltól, sum stendur í stungudósini hjá einstøku brúkarunum? Tað framgongur ikki av uppskotinum, hvussu hesi viðurskifti skulu umsitast.

Tað skal at enda viðmerkjast, at Fíggjarmálaráðið í februar 2016 sendi Heilsu- og innlendismálaráðnum viðmerkingar, dagfestar 4. februar 2016, til annað uppskot, ið hevði sama heitið sum hetta uppskotið.

**Vinarliga**

**Mortan Simonsen**
ráðgevi

Tinganes • Postsmoga 2039 • FO-110 Tórshavn
Telefon: + 298 35 22 00 • Telefax: + 298 35 22 01 • E-mail: FMR@FMR.FO